FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 3. september 2021
J. nr.: 21/16756
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-023/2021 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um at skipa beinleiðis bussrutu úr Vágum til Miðnám í Vestmanna.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er ætlanin at skipa eina beinleiðis bussrutu úr Vágum til Miðnám í Vestmanna?

Svar
Øll skulu hava møguleika fyri at taka eina gymnasiala útbúgving ella yrkisrættaða útbúgving. Ein týðandi fortreyt er, at ferðasambandið millum heim og skúla er gott.

Ferðaætlanin hjá Bygdaleiðum millum Vágar og Miðnám í Vestmanna, er løgd í neyvum samstarvið millum Strandferðsluna og leiðsluna á skúlanum. Sambært teimum passar ferðaætlanin væl til skúlagongdina hjá næmingunum.

Nevnast kann, at avbjóðingar vóru við bússsambandinum millum Sundalagið og Vestmanna. Fyri at gera tað lættari hjá næmingum úr Sundalagnum (Eysturoy og Norðoyggjum) at ferðast til Miðnám í Vestmanna, var leið 460 íverksett fyrr í ár, har bussur koyrur frá Oyrabakka til Kollafjarðar.

Næmingar úr Sundalagnum (Eysturoy og Norðoyggjum), úr Havn og Vágum savnast í Kollfjarðadali, og fara saman við bussinum til Vestmanna.

Okkum kunnugt er leiðslan á Miðnámi í Vestmanna, sum heild nøgd við busssambandið eftir tillagingarnar í vár.

Um so er at ein beinleiðis bussruta verður skipað úr Vágum til Vestmanna, fara tveir bussar samstundis til Vestmanna.

Sum kunnugt var nýggj beinleiðis bussruta sett inn millum Glasir og Vágar, sum gjørdi tað høgligari hjá næmingunum at sleppa til hús eftir loknan skúladag.

Arbeitt verður við busssambandi millum Gásadal, Bø og Sørvág, soleiðis at millum annað miðnámsnæmingar úr hesum bygdum, hava busssamband millum heimbygd og Miðnámsskúla.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Strandferðslan eftirmetir javnan ferðaætlanina fyri ymsu Bygdaleiðirnar, herímillum eisini busssambandið til og frá Miðnámi í Vestmanna.

Samanumtikið vil landsstýrismaðurin virka fyri, at ungdómurin hevur góðar umstøður at ferðast millum heim og skúla.

Tinganes, 3. september 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum